FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

**Reglugerð**
**fyri**
**veiting av stuðulsjáttan til útoyggjamenning 2026**

Við atliti at stuðulsjáttan 3.37.2.19 *Stuðul til útoyggjamenning*, verða hesar leiðreglur ásettar:

**1. Endamál**
1.1. Endamálið er at stuðla tiltøkum í útoyggjum, sum eru mennandi fyri hesar. Útoyggjar, sum koma undir hesa skipan, eru: Fugloy, Svínoy, Kalsoy, Mykines, Hestur, Koltur, Skúvoy og Stóra Dímun.

**2. Stuðulstreytir**
2.1. Stuðul kann veitast einstaklingum, virkjum, feløgum og kommunum.

2.2. Stuðulin skal í minst møguligan mun virka kappingaravlagandi.

2.3. Umsóknir hava framíhjárætt, um verkætlanin styrkir livigrundarlagið hjá búfólki á staðnum ella varðveitir søguligar karmar, náttúru, umhvørvi ella annað týdningarmikið virksemi á oynni.

2.4. Umsóknir hava framíhjárætt, tá ið umsøkjarin býr og hevur dagligt virksemi á oynni.

2.5. Søkjast kann upp til tríggjar ferðir til somu verkætlan.

**3. Stuðul til serligt endamál**
3.1. Er stuðul settur av til serligt endamál í viðmerkingunum á fíggjarlógini, skal henda upphædd nýtast til ásetta endamál.

3.2. Er stuðul settur av uttan nærri endamál, kann Fíggjarmálaráðið gera av, um stuðulin skal nýtast til serligt endamál, um mett verður, at tað er átrokandi at stuðla innan ávíst øki.

**4. Umsókn**
4.1. Lýst verður eftir umsóknum á heimasíðu Fíggjarmálaráðsins. Freistin at søkja er 20. februar í stuðulsárinum, uttan so at lýst verður við aðrari freist á heimasíðu ráðsins.

4.2. Umsóknir skulu skrivast á oyðublað nevnt *Umsóknarblað til stuðul av játtanini til útoyggjamenning*, sum er tøkt á heimasíðu Fíggjarmálaráðsins.

4.3. Umsókn skal vera grundað á fíggjarætlan fyri árini, ið verkætlanin fevnir um. Eisini skulu átøk og virksemi fyri stuðulsárini verða lýst.

Tinganes • Postrúm 2039 • FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 35 20 20 • T-postur: fmr@fmr.fo • www.fmr.fo

**5. Játtan**

5.1. Játtanin verður latin, um stuðul er til taks á fíggjarlógini, konto 3.37.2.19. *Stuðul til útoyggjamenning.*

5.2. Játtan av umsóknini verður latin við grundarlagi í umsóknini í seinasta lagi tveir mánaðir eftir, at freistin at søkja er farin.

5.3. Fíggjarmálaráðið tilskilar sær rætt til, um tað verður mett neyðugt, at senda umsóknina til ummælis hjá fakliga serkønum.

5.4. Fíggjarmálaráðið kann krevja upplýsingar um innlit í arbeiðsgongdina, og hvussu peningurin verður nýttur í verkætlanarskeiðinum.

5.5. Verður øll játtanin ikki nýtt í fyrsta umfari, ella um játtaður stuðul fellur aftur, verður lýst eftir fleiri umsóknum við nýggjari umsóknarfreist.

**6. Útgjald av stuðli**

6.1. Stuðulin verður latin sambært treytunum í hesi reglugerð og játtanarlóg landsins. Stuðulin verður útgoldin, tá ið umsøkjarin hevur góðtikið treytirnar í stuðulsjáttanarfráboðanini.

6.2. Er ikki av álvara farið undir arbeiðið, sum hevur fingið játtað stuðul, seks mánaðir eftir, at stuðulin er játtaður, fellur tilsøgnin burtur, um ikki annað er avtalað við Fíggjarmálaráðið. Fellur tilsøgnin burtur skal stuðulin gjaldast aftur.

6.3. Útgoldin stuðul verður kravdur afturgoldin, um avlop er í mun til avtalaða virksemið.

**7. Fíggjarætlan, roknskapur og grannskoðan**

7.1. Fíggjarætlan, sum verður løgd saman við umsókn, skal lýsa væntaðar inntøkur og út-reiðslur.

7.2. Roknskapur fyri stuðulsárið skal lúka treytirnar sambært §§ 21 ella 22 í kunngerð um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan.

7.3. Grannskoðaður ársroknskapur fyri veittan stuðul skal vera latin Fíggjarmálaráðnum í seinasta lagi 1. apríl árið eftir (undantak lýst í 7.4.).

7.4. Fyri stuðul, sum verður veittur einaferð, og sum er minni enn 100.000 kr. kann í staðin fyri grannskoðaðan roknskap (sí 7.3.) latast Fíggjarmálaráðnum frágreiðing við neyðugum próvtilfari í seinasta lagi 1. apríl árið eftir.

**8. Gildiskoma**

8.1. Hesar reglur koma í gildi 29. januar 2026. Samstundis fer reglugerð fyri útoyggjamenning dagfest 16. januar 2025 úr gildi.

Fíggjarmálaráðið, 29. januar 2026

**Ruth Vang (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Bjarni Askham Bjarnason (sign.)

Tinganes • Postrúm 2039 • FO-110 Tórshavn
Tlf. +298 35 20 20 • T-postur: fmr@fmr.fo • www.fmr.fo